# Frágreiðing til aðalfundin hjá Svimjisambandi Føroya




Fyri tíðarskeiðið 7. oktober 2017 til 12. oktober 2018

ATLANTIC AIRWAYS

# Felagsskapurin

## Starvsnevnd

Seinasta árið hevur starvsnevndin í Svimjisambandi Føroya verið: Rókur í Jákupsstovu, formaður, Anita Ryggshamar Nysted, næstformaður, Anni á Hædd, skrivari, Sørin S. Djurhuus og Katrin Sørensen, nevndarlimir, umframt Dann Hjelm, tiltakslimur. Av persónligu ávum var Katrin í farloyvi til hin 22. februar 2018, og var Dann tá í  nevndini fyri hana. Samstarvið hevur riggað væl.

Nú til aðalfundin 2018 hevur Katrin biðið seg undan at verða afturvald í starvsnevndina, og vil eg tí nýta høvið til at takka hana fyri hennara arbeiði og íkast, hesi fýra árini í starvsnevnd SSF.

## Svimjinevnd

Tað hevur ikki eydnast okkum í sambandi og feløgum at manna eina nýggja svimjinevnd, og hevur starvsnevndin tí røkt eisini hesar uppgávur við hjálp frá serliga vertsfeløgunum til meistarastevnur okkara: Havnar Svimjifelag í sambandi við FM á stuttgeil 2017 (2), Ægir ísv FOMM 2017 og ABMS 2018, og Suðuroyar Svimjifelag ísv FM á langgeil 2018.

Hesar uppgávur vórðu røktar fyrimyndarliga væl av feløgum umframt lyklapersónum úr feløgum og sambandi. Tørvur er tó avgjørt enn á eini svimjinevnd, sum kann viðgera ivamál og ósemjur við eini ávísari frástøðu til starvsnevndina, og sum kann virka til, at vit í felag fáa ment okkara stevnur.

## Landsliðsnevnd

Hetta árið hevur eingin landsliðsnevnd verið, og hava viðkomandi uppgávur tí verið røktar av serliga starvsnevndini, við hjálp frá høvuðsvenjarum og formonnum í feløgum við landsliðssvimjarum.

## Mastersnevnd

Tíverri er eisini mastersnevndini dottin niðurfyri, og varð uppgávan at skipa fyri FOMM 2017 tí røkt serliga av Ægir-formanninum Rannvá Sigfríðsdóttir, umframt av undirritaða formanni í starvsnevnd SSF. Hendan støða er ikki nøktandi, og viðgjørdi seinasti kalendarafundur tí eisini at niðurleggja FOMM, har neyðsemjan varð at Rannvá og Eyðun Húsgarð lovaðu at fyriskipa FOMM 2018.

## Dómsnevnd

Í dómsnevndini sita Janus Rein, formaður, og nevndarlimir Poul Poulsen og Jórun Eið Johannesen. Okkum kunnugt hevur einki mál hevur verið sent teimum at viðgera hetta farna árið.

## Dómarar

Hesi seinastu árini hava yvirdómarar okkara verið altjóða dómarin Dann Hjelm, umframt hesir útbúnu yvirdómarar Elin Matras, Katja Lervig, Thurid Kjærbo, Annika N. Johannesen og Rúni Gaardbo. Vegna krøv frá FINA fingu vit okkum uttanlanda styrk til ABMS 2018, og fáa tað til FM á stuttgeil 2018, so at hesar stevnur kundu góðkennast sum úttøkustevnur til HM á stuttgeil 2018. Til ABMS vóru tað altjóða yvirdómarin Viktoría Gísladóttir og altjóða startdómarin Ásmundur Jónsson, bæði úr Íslandi, meðan teir til FM á stuttgeil 2018 verða okkara egni altjóða yvirdómari Dann Hjelm, umframt altjóða startdómarin Claus Vestergaard úr Danmark. Í august tilnevndu vit tríggjar føroyskar yvirdómarar og tveir føroyskar startdómarar til FINA lista nr 20, og bíða vit nú eftir svari.

## Svimjiskúlin

Jórun Eið Johannesen er saman við Pálini Olsen og Rúna Gaardbo oddafólk í Svimjiskúla Føroya. Harumframt hva vit afturat teimum nú eisini útbúnu undirvísararnar: Johan Petur Poulsen, Lis Gøthe í Jákupsstovu og Rók í Jákupsstovu. Jórun, Pálin og Rúni vóru í september á norðurlendsku Learn-to-Swim ráðstevnuni í Finnlandi, og hevur skúlin bjóðað út skeið í Merkjaskipanini í august og í november.

## Lívbjarging

Sørin S. Djurhuus stendur saman við Djóna Dalsgarð á odda fyri lívbjargingarátaki okkara, sum áhaldandi mennist og rótfestist bæði hjá okkum í føroysku svimjingini, umframt hjá stovnum, kommunum, skúlum og øðrum felagskapum.

Eitt nýtt og spennandi er nú í næstu viku, har vit ætla at víðka til eisini at fáast við svimjitrygd uttanfyri svimjihallir, við millum øðrum kunngjørdu ætlan um at fáa bjargingarnummur sett upp í havnaløgum. Aðrar ætlanir eru eisini á skrá, so sum eitt átak at fáa øll at nýta bjargingarvestar, tá ið tey eru í báti ella nær sjógvi og líknandi.

## Skrivstova og roknskapur

Djóni Dalsgarð er aðalskrivari í Svimjisambandinum, og hevur skrivstovan riggað væl. Símun Michael Sørensen er kassameistari, og hevur nú síðani 2014 avgreitt roknskapirnar við ágrýtni og nærlagni, umframt at ráðgeva við uppsetan av nýggjum og betri bókhaldi. Nú til roknskapin fyri 2017 hava vit skift bókhaldsskipan frá Lundanum til Dynamics NAV C5, so at vit millum annað fara at kunna stovna og senda rokningar beinleiðis úr skipanini, umframt betur at kunna síggja leypandi fíggjarstøðu. Grannskoðari SSF er Menta, sum vit eru sera vælnøgd við.

## Felagsskapurin

Afturat okkum sjálvum í nevndum SSF og feløgum, er ein rúgva av góðum kreftum afturat í svimjingini, sum vit meira enn so hava dúvað uppá, serliga í sambandi við meistarastevnur og landsliðsvirksemi. Hetta er dýrabærur stuðul, sum vit lukkutíð fáa meira ella minni fyri einki.

Hartil eru kalendarafundurin og nýggja svimjiráðstevnan tvær sera góðar keldur til hjálp og konsensus, tá ið tað kemur til at skipa virksemið innan føroyska svimjing. Serliga ráðstevnan við Gjógv bar av, tá ið vit í einum slagi av hugaroki við konsekvensi loystu smáar, men týðandi spurningar, so sum at tillaga regluna fyri aldursbýti í liðsvimjing.

Umframt sjálvsagt árliga aðalfundinum, formansfundum og -samskifti í teimum førum tá ið okkurt serliga átroknandi er. Hetta hevur alt sum heild riggað sera væl, og vit eru glað fyri at feløgini eru røsk at melda aftur, eisini tá ið meiningarnar ganga ímóti okkara egnu ætlanum.

## Limir í føroyskum svimjifeløgum

Tann 3. oktober 2017 vóru tað tilsamans 771 skrásettir limir í føroyskum svimjifeløgum, harav 401 konufólk og 370 mannfólk.

Býtið millum feløg var 287 í Havnar Svimjifelag, 138 í Suðuroyar Svimjfelag, 113 í Ægir, 93 í FLOT, 77 í Reysta og 63 í Fuglafjarðar Svimjifelag.

Vit hava tíverri ikki øll tilsvarandi tøl enn fyri 2018, men vita at tey eru 157 í Suðuroyar Svimjifelag, 129 í Ægir, 116 í FLOT og 82 í Reysta, sum øll eru vaksandi tøl.

# Svimjiárið 2017-2018

## FINA stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg og SSF skipaðu hetta árið fyri tilsamans 13 FINA-góðkendum svimjistevnum í svimjihallum, harav 4 meistarastevnum, har málbólkurin vóru føroysk børn, ung, vaksin og masters. ABMS var hartil góðkend av FINA sum úttøkustevna til HM á stuttgeil 2018.

| Stevna | Staður | Dagfesting | Hylur | Kapp. | Feløg | Íðkarar | Lið | Úrslit | FINA* |
|---|---|---|---:|---:|---:|---:|---:|---:|---:|
| HS Open | Tórshavn | 23.-24. sep. 17 | 25m | 34 | 4 | 92 | 0 | 541 | 716 |
| Ægir Open | Klaksvík | 21.-22. okt. 17 | 25m | 40 | 6 | 131 | 64 | 845 | 765 |
| FM á stuttgeil 2 | Tórshavn | 3.-5. nov. 17 | 25m | 66 | 5 | 68 | 34 | 579 | 765 |
| FOMM | Klaksvík | 18. nov. 17 | 25m | 19 | 6 | 33 | 9 | 103 | 520 |
| HS Xmas Open | Tórshavn | 21. des. 17 | 25m | 30 | 6 | 108 | 32 | 782 | 651 |
| SuSvim Open | Vágur | 13.-14. jan 18 | 50m | 34 | 5 | 87 | 19 | 551 | 685 |
| Ægir Open | Klaksvík | 10.-11. feb. 18 | 25m | 40 | 6 | 115 | 48 | 783 | 715 |
| SuSvim Open | Vágur | 24.-25. feb. 18 | 50m | 36 | 5 | 86 | 29 | 564 | 744 |
| HS Open | Tórshavn | 23.-24. mar. 18 | 25m | 28 | 5 | 86 | 22 | 353 | 699 |
| SuSvim Open | Vágur | 7.-8. apr. 18 | 50m | 34 | 5 | 85 | 28 | 484 | 771 |
| HS Ung | Tórshavn | 28. apr. 18 | 25m | 26 | 6 | 91 | 18 | 370 | 469 |
| ABMS | Klaksvík | 10.-12. mai 18 | 25m | 40 | 6 | 167 | 66 | 1277 | 783 |
| FM á langgeil | Vágur | 8.-10. juni 18 | 50m | 69 | 5 | 63 | 53 | 615 | 762 |

## Aðrar stevnur í føroyskum svimjihallum

Føroysk svimjifeløg skipaðu hartil hetta árið fyri 6 svimjistevnum í skúlahyljum stytri enn 25 metrar, fyri okkara yngstu aldursbólkar: Reysta-stevna í Leirvík hin 28. okt. 17, FS-stevna í Fuglafirði hin 25. nov. 17, FLOT-stevna á Toftum hin 3. feb. 18, HS-stevna í Kollafirði hin 17. feb. 18, Reysta-stevna í Leirvík hin 10. mar. 18 og SuSvim-stevna á Tvøroyri hin 17. mar. 18.

# Uttanlanda og altjóða stevnur

Føroyskir svimjarar kappaðust hetta árið tilsamans minst 523 ferðir sum einstaklingar og 20 ferðir sum lið, á 22 uttanlanda stevnum, harav 5 vóru altjóða meistarastevnur. Á hesum stevnum vunnu okkara svimjarar minst 23 gull, 18 silvur og 12 bronsur. Hartil luttók ein hópur á Køge Open 2017 í Køge og Herfølge, eisini við góðu úrslitum, sum tíverri ikki enn eru skrásett á SwimRankings.

Serliga nevnivert er, at Óli Mortensen og Signhild Joensen vunnu gull á NM 2017, og at vit 'vunnu' Bergen Swim Festival 2018, við okkara nýstovnaða bruttolandsliði.

| Stevna | Land | Dagfesting | Hylur | Íðkarar | Lið | Úrslit | Gull | Silvur | Bronsa | FINA* |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Alm. Brand Bank Cup | DEN | 9. sep. 17 | 25m | 2 | 0 | 8 | 4 | 4 | 0 | 727 |
| GTI Cup | DEN | 23.-24. sep. 17 | 25m | 1 | 0 | 4 | 2 | 0 | 1 | 711 |
| DM for Hold | DEN | 7.-8. okt. 17 | 25m | 3 | 0 | 11 | 0 | 0 | 0 | 786 |
| DM kortbane | DEN | 9.-12. okt. 17 | 25m | 3 | 0 | 16 | 2 | 1 | 0 | 820 |
| NM/NJM | ISL | 1.-3. des. 17 | 25m | 20 | 11 | 117 | 2 | 0 | 1 | 830 |
| Alm. Brand Aalborg Cup | DEN | 8.-10. des. 17 | 25m | 1 | 0 | 9 | 0 | 0 | 1 | 645 |
| EM á stuttgeil | DEN | 13.-17. des. 17 | 25m | 4 | 1 | 15 | 0 | 0 | 0 | 799 |
| Arena Lyngby Open | DEN | 19.-21. jan. 18 | 50m | 2 | 0 | 14 | 0 | 0 | 0 | 633 |
| Reykjavík International | ISL | 26.-28. jan. 18 | 50m | 14 | 0 | 105 | 3 | 4 | 5 | 758 |
| Swedish Grand Prix | SWE | 27.-28. jan. 18 | 50m | 2 | 0 | 9 | 0 | 1 | 1 | 758 |
| Championnat Regional | FRA | 24.-25. feb. 18 | 50m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 576 |
| 8 Trofeo Citta di Milano | ITA | 9.-10. mar. 18 | 50m | 2 | 0 | 8 | 0 | 1 | 0 | 764 |
| Cct Sabadell | ESP | 10.-11. mar 18 | 50m | 2 | 0 | 11 | 0 | 2 | 1 | 785 |
| Triple Meet | DEN | 21. mar. 18 | 50m | 2 | 0 | 5 | 3 | 1 | 1 | 757 |
| Swim Open Stockholm | SWE | 5.-8. apr. 18 | 50m | 2 | 0 | 8 | 0 | 0 | 0 | 801 |
| Danish Open | DEN | 13.-15. apr. 18 | 50m | 2 | 0 | 9 | 0 | 2 | 1 | 816 |
| Bergen Swim Festival | NOR | 13.-15. apr. 18 | 50m | 18 | 0 | 88 | 7 | 2 | 0 | 776 |
| Mare Nostrum BCN | ESP | 13.-14. jun. 18 | 50m | 1 | 0 | 2 | 0 | 0 | 0 | 769 |
| Mare Nostrum Monaco | MON | 16.-17. jul. 18 | 50m | 1 | 0 | 1 | 0 | 0 | 0 | 613 |
| EJM | FIN | 4.-8. jul. 18 | 50m | 6 | 2 | 27 | 0 | 0 | 0 | 697 |
| NMU | LAT | 14.-15. jul. 18 | 50m | 11 | 6 | 48 | 0 | 0 | 0 | 630 |
| EM á langgeil | GBR | 3.-9. aug. 18 | 50m | 2 | 0 | 6 | 0 | 0 | 0 | 774 |

# Landsliðshópar 2017-2018

## NM/NJM 2017 í Reykjavík

**Svimjarar**:  Alisa Vestergaard (2003), Sára R. Nysted (2001) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Ásbjørg Hjelm (1999) úr Reysta, Barbara Debes (2000), Jana B. Thomsen (2000), Signhild Joensen (2000), Rebekka Trygvadóttir (2004), Martin V. Sivertsen (2002), Rókur Trygvason (2000) og Alvi Hjelm (1996) úr Ægir, Lena Rannváardóttir (1998), Lív E. Eidesgaard (1999), Eyðrið Mortensen (2003), Súsanna Tummasardóttir (2001), Vár E. Eidesgaard (2001), Bartal E. Eidesgaard (2003), Johan N. Dam (2002), Niels Nattestad (1998), Markus Joensen (1996) og Óli Mortensen (1996) úr HS

**Venjarar**: Rúni Gaardbo, Dánjal Martin Hofgaard og Oleksii Ilchenko

**Ferðaleiðarar**: Anita R. Nysted og Finnbjørg Nattestad

## EM á stuttgeil 2017 í Keypmannahavn

**Svimjarar**: Signhild Joensen (2000) og Alvi Hjelm (1996) úr Ægir, Vár E. Eidesgaard (2001)og Óli Mortensen (1996) úr Havnar Svimjifelag

**Venjarar**: Juan Jaime Arroyo Toledo

**Ferðaleiðari**: Anni á Hædd

## Bergen Swim Festival 2018 í Bergen

**Svimjarar**: Beinta P. Debes (1997), Eyðrið Mortensen (2003), Lena Rannváardóttir (1998), Vár E. Eidesgaard (2001), Johan N. Dam (2002), Marius I. Gardshodn (1998) og Niels Nattestad (1998) úr HS, Barbara Debes (2000), Rebekka Trygvadóttir (2004), Signhild Joensen (2000), Sólva A. Sigurðsson (2002) og Rókur Trygvason (20002) úr Ægir, Alisa Vestergaard (2003), Sára R. Nysted (2001), Rani Jacobsen (2001) og Róland Toftum (1998) úr SuSvim, Ásbjørg Hjelm (1999) úr Reysta og Birita Debes (1995) úr FLOT

**Venjarar**: Juan Jaime Arroyo Toledo, Jóannes á Fløtti, Dánjal M. Hofgaard og Eva Trygvadóttir

**Ferðaleiðari**: Anita R. Nysted

## EJM 2018 í Helsinki

**Svimjarar**: Alisa Vestergård (2003) og Rani Jacobsen (2001) úr SuSvim, Rebekka Trygvadóttir (2004) og Rókur Trygvason (2000) úr Ægir, Vár E. Eidesgaard (2001) og Johan N. Dam (2002) úr HS

**Venjarar**: Rúni Gaardbo og Jóannes á Fløtti

**Ferðaleiðari**: Anni á Hædd

## NMU 2018 í Riga

**Svimjarar**: Alisa Vestergård (2003) og Bartal Debess (2002) úr Suðuroyar Svimjifelag, Jonna Joensen (2005), Rebekka Trygvadóttir (2004) og Martin V. Sivertsen (2002) úr Ægir, Elisabeth Erlendsdóttir (2005), Eyðrið Mortensen (2003), Kristina í Skála (2005), Bartal E. Eidesgaard (2003), Johan N. Dam (2002) og Høgni H. Thomassen (2002) úr Havnar Svimjifelag

**Venjarar**: Rúni Gaardbo og Jóannes á Fløtti

**Ferðaleiðari**: Lis Gøthe í Jákupsstovu

## EM 2018 í Glasgow

**Svimjarar**: Signhild Joensen (2000) úr Ægir, Alvi Hjelm (1996) úr Havnar Svimjifelag

**Venjari**: Juan Jaime Arroyo Toledo

**Ferðaleiðari**: Rókur í Jákupsstovu

# Føroysk met og juniormet

Svimjiárið 2017-2018, tað vil siga frá 1. september 2017 til 31. august 2018, settu føroyskir svimjarar tilsamans 19 føroysk met og 23 føroysk juniormet,.

Til samanberingar settu føroyskir svimjarar tilsamans 32 føroysk met og 30 føroysk juniormet, undanfarna svimjiárið 2016-2017.

Metlistarnir vórðu um ársskiftið 2017/2019 fluttir til SwimRankings við leinki frá heimasíðu SSF, og tað tykist at rigga væl. Eitt írestandi er at fáa landsliðsmetini yvir eisini, og er hetta á veg.

## Føroysk juniormet

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 100 | Rygg | 25m | K | 01:01.32 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | Ægir okt 17 | 2017-10-21 | FAR |
| 100 | Rygg | 25m | K | 01:01.00 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | Ægir okt 17 | 2017-10-21 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 25m | K | 04:25.53 | Signhild Joensen, Rebekka Trygvadóttir, Jana B. Thomsen, Barbara Debes | 2000 | Ægir | Ægir okt 17 | 2017-10-21 | FAR |
| 100 | Frí | 25m | K | 00:57.09 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM 2017 S | 2017-11-03 | FAR |
| 4x100 | Frí | 25m | K | 03:54.86 | Barbara Debes, Jana B. Thomsen, Rebekka Trygvadóttir, Signhild Joensen | 2000 | Ægir | FM 2017 S | 2017-11-03 | FAR |
| 100 | Rygg | 25m | K | 01:00.91 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | NM/NJM 17 | 2017-12-02 | ISL |
| 100 | Rygg | 25m | K | 01:00.50 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | NM/NJM 17 | 2017-12-02 | ISL |
| 100 | Frí | 25m | K | 00:56.98 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | NM/NJM 17 | 2017-12-02 | ISL |
| 50 | Rygg | 25m | K | 00:28.75 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | NM/NJM 17 | 2017-12-02 | ISL |
| 200 | Frí | 25m | K | 02:02.18 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | NM/NJM 17 | 2017-12-02 | ISL |
| 50 | Frí | 50m | K | 00:27.17 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | SuSvim feb 18 | 2018-02-24 | FAR |
| 100 | Frí | 50m | K | 00:58.12 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | SuSvim feb 18 | 2018-02-24 | FAR |
| 50 | Firvald | 50m | K | 00:28.54 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | SuSvim feb 18 | 2018-02-25 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | M | 04:32.57 | Rúni Bech, Rani Jacobsen, Rói Bech, Bartal Debess | 2001 | SuSvim | SuSvim feb 18 | 2018-02-25 | FAR |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4x100 | Frí | 50m | M | 04:03.19 | Bartal Debess, Rani Jacobsen, Rói Bech, Rúni Bech | 2001 | SuSvim | SuSvim apr 18 | 2018-04-07 | FAR |
| 4x100 | Blandað | 50m | M | 04:27.12 | Óðin Jákupsson, Bartal E. Eidesgaard, Johan N. Dam, Høgni H. Thomassen | 2002 | HS | SuSvim apr 18 | 2018-04-08 | FAR |
| 100 | Bringa | 50m | M | 01:06.14 | Rókur Trygvason | 2000 | Ægir | BSF 2018 | 2018-04-13 | NOR |
| 50 | Firvald | 50m | K | 00:28.44 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | BSF 2018 | 2018-04-14 | NOR |
| 50 | Frí | 50m | K | 00:27.09 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | BSF 2018 | 2018-04-15 | NOR |
| 50 | Frí | 50m | K | 00:26.84 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | BSF 2018 | 2018-04-15 | NOR |
| 50 | Frí | 50m | K | 00:26.52 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | BSF 2018 | 2018-04-15 | NOR |
| 4x200 | Frí | 50m | M | 08:52.91 | Rókur Trygvason, Martin V. Sivertsen, Dennis Voropaev, Natanael A. Matras | 2000 | Ægir | FM á langgeil | 2018-06-09 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | M | 03:57.26 | Rókur Trygvason, Martin V. Sivertsen, Dennis Voropaev, Natanael A. Matras | 2000 | Ægir | FM á langgeil | 2018-06-10 | FAR |

## Føroysk met

| Teinur | Grein | Hylur | Kyn | Tíð | Svimjari | Aldur | Felag | Stevna | Dagur | Land |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 100 | Rygg | 25m | K | 01:01.32 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | Ægir okt 17 | 2017-10-21 | FAR |
| 100 | Rygg | 25m | K | 01:01.00 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | Ægir okt 17 | 2017-10-21 | FAR |
| 100 | Frí | 25m | K | 00:57.09 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | FM 2017 S | 2017-11-03 | FAR |
| 4x100 | Frí | 25m | K | 03:54.86 | Barbara Debes, Jana B. Thomsen, Rebekka Trygvadóttir, Signhild Joensen | 2000 | Ægir | FM 2017 S | 2017-11-03 | FAR |
| 100 | Rygg | 25m | K | 01:00.91 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | NM/NJM 2017 | 2017-12-02 | ISL |
| 100 | Rygg | 25m | K | 01:00.50 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | NM/NJM 2017 | 2017-12-02 | ISL |
| 100 | Frí | 25m | K | 00:56.98 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | NM/NJM 2017 | 2017-12-02 | ISL |
| 200 | Frí | 25m | K | 02:02.18 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | NM/NJM 2017 | 2017-12-02 | ISL |
| 100 | Frí | 50m | K | 00:58.12 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | SuSvim feb 18 | 2018-02-24 | FAR |
| 4x50 | Blandað | 25m | M | 01:50.96 | Bartal Debess, Rani Jacobsen, Róland Toftum, Rói Bech | 1998 | SuSvim | HS mar 18 | 2018-03-23 | FAR |
| 50 | Bringa | 25m | M | 00:28.62 | Róland Toftum | 1998 | SuSvim | HS mar 18 | 2018-03-24 | FAR |
| 100 | Rygg | 50m | K | 01.03.34 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | SuSvim apr 18 | 2018-04-07 | FAR |
| 100 | Rygg | 50m | K | 01:03.01 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | BSF 2018 | 2018-04-14 | NOR |
| 50 | Frí | 50m | K | 00:26.84 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | BSF 2018 | 2018-04-15 | NOR |
| 50 | Frí | 50m | K | 00:26.52 | Vár E. Eidesgaard | 2001 | HS | BSF 2018 | 2018-04-15 | NOR |
| 4x100 | Blandað | 50m | M | 04:11.85 | Óli Mortensen, Alvi Hjelm, Niels Nattestad, Bartal E. Eidesgaard | 1996 | HS | FM á langgeil | 2018-06-08 | FAR |
| 4x200 | Frí | 50m | M | 08:05.01 | Óli Mortensen, Niels Nattestad, Alvi Hjelm, Bartal E. Eidesgaard | 1996 | HS | FM á langgeil | 2018-06-09 | FAR |
| 4x100 | Frí | 50m | M | 03:40.47 | Óli Mortensen, Johan N. Dam, Alvi Hjelm, Bartal E. Eidesgaard | 1996 | HS | FM á langgeil | 2018-06-10 | FAR |
| 50 | Rygg | 50m | K | 00:29.54 | Signhild Joensen | 2000 | Ægir | EM 2018 | 2018-08-04 | GBR |

# Open Water (Havsvimjing)

Føroysk svimjifeløg skipaðu í øllum førum fyri hesum Open Water stevnum, hetta árið:

- Svimjing á Jóansøku hin 23. juni 2018
- Ólavsøkusvimjing hin 28. juli 2018
- Svimjing á Sjómannadegnum hin 18. august 2018

Hartil vóru onnur tiltøk, so sum serliga Nólsoyarsvimjingin hin 4. august 2018 og svimjing á Sundalagsstevnuni, ið eru leysari ella als ikki atknýtt føroyskum svimjifeløgum.

# Annað virksemi 2016-2017

## SSF

Føroysk svimjing er vaksin til at verða ein sera virkin felagskapur, við afturvendandi tiltøkum so gott sum alt árið, og við støðugt nýggjum avbjóðingum og tilboðum at skula fyrihalda seg til.

Trý tey størstu feløgini hava nú roynt seg við útlendskum venjarum, og tvey hava útlendskan venjara í verandi løtu. Hesir venjarar koma við somikið øðrvísi íkasti, at tað gevur eina veruliga saltvatnsinnspræning til okkara svimjiumhvørvi, umframt tær avbjóðingar sum náttúrliga komast av mentanarmunum.

Tað er eisini vorðið heilt vanligt, at bæði landslið og feløg fara uttanlands at venja og kappast, eisini saman við útlendskum svimjarum, umframt at svimjiáhugað koma hendan vegin at síggja okkara svimjiumhvørvi. Og vit smæðast ikki burtur heldur, hvørki í kapping, venjingum ella í samskiftum.

Stóra avbjóðingin er tó enn sum áður, at vit eru so fá, harav enn færri seta tíð og orku av til alt hetta ymiska. Sjálvbodni felagsskapurin stendur snøgt sagt fyri hóttafalli, og tí er brennandi spurningurin, um vit skulu gevast á hondum og og ganga ta leið at øll eru lønt, heldur enn at halda fast við tað sjálvbodnað.

Í Svimjisambandinum royna vit enn at gera tað seinna, og tí er rættiliga nógv orka eisini farin til at skipa fyri tiltøkum fyri okkum vaksnu. Til at menna okkum, men eisini til at fáa eina betri fatan fyri hvørjum øðrum. Til dømis við Svimjiráðstevnuni sum í ár var við Gjógv hin 2. til 4. mars 2018, og við skeiðum.

## ÍSF

Støðan við og í ÍSF er batnað heilt nógv, síðani rokið sum var, og síðani skiftið av allari starvsnevnd ÍSF í 2016. Nýggja ÍSF tykist so avgjørt at hava funnið síni bein, so mikið at tað nú yvirskot til at ganga ígjøgnum skipanir og mannagongdir í felagsskapinum, og um neyðugt at betra tær.

Hálvárligu umboðstingini hava nú fingið tað skap, sum tey eisini eftir okkara tykki eiga at hava: Ein kunning til sersambondini um alt tað ymiska, sum er í umbúna, umframt at tey eru ein møguleiki at lodda dýpið um, hvat ið vit halda, til dømis um møguliga staðseting av nýggjum ÍSF-húsi.

Eitt serligt í ár er "Faroe Olympics"-átakið hjá ÍSF, til at royna at fáa okkum olympiska limaskap. SSF stuðlar sjálvsagt hesum átaki fult og fast, við stuðli frá eisini sjálvum forsetanum í FINA.

## NSF

Hetta árið hevur verið sera turbulent í Nordic Swimming Federation. Frá at Noreg, Danmark og Svøríki á fundi í Keypmannahavn í desember 2017 skutu upp at avtaka felagsskapin, til at vit í Budapest í juni 2018 einmælt samtyktu at vilja varðveita hann við ávísum tillagingum í evstulógini.

Í Budapest fekk Svøríki 'forfólksskapin', og hevur tað síðani verið sera lítið at hoyra frá hesum felagsskapi, í mun til til tað sum vit vóru von við. Tað er ikki greitt enn, hvussu og nær henda uppgáva fer víðari til næsta limaland. Eftir ætlan eru tað vit, sum tá eiga tørn.

## LEN

Í LEN eru vit nú so mikið langt frá valinum í 2016, til tað sum koma skal í 2020, at tað ikki er sama malør um møguligar kandidatar og líknandi, og tí eisini betri høvi at viðgera verulig svimjiviðurskifti.

Jon Hestoy er sum kunnugt virkin næstformaður í teknisku nevnd LEN fyri Open Water, og undirritaði er skrivari í miðlanevndini hjá LEN. Afturat hesum hava vit bjóðað okkum fram sum pilotland í LEN LSPD verkætlanini til at betra um svimjiførleikan í Evropa, og tí eru vit eisini í stýrisbólkinum har.

Eitt ávíst samskifti hevur verið við LEN um okkara FINA-góðkendu hettur, sum brádliga vórðu avvístar í 'call room' á EM á stuttgeil 2017. Hendan støða kom uppá pláss, so at okkara svimjarar kundu brúka somu hettur á EJM 2018, og síðani eitt nýtt sett av hettum til EM 2018.

## FINA

Eftir kampvalið í Budapest í 2017 tykist FINA veruliga at hava lagt seg í selarnar, at bjóða sínum limalondum og kanska serliga okkum smáu burturav sínum ríkidømi, á skilagóðan hátt við fíggjarligum stuðli til menning og útbúgving og líknandi.

Bara hetta árið njóta vit í Føroyum til dømis gott av teirra Olympic Aquatics Support Programme, sum hevur givið okkum møguleikan at keypa útgerð og serfrøði til menning av landsliðstestum. Umframt at vit væntandi fáa stuðul til Svimjifagnaðin sum var í Klaksvík í september, og at FINA fíggjar undirvísara o.a. til FINA Coaches Certification Programme skeiðið í Tórshavn í desember.

## Parasport

Nú í desember verður parasport fyri fyrsti ferð partur av 'okkara' NM í svimjing. Hetta er eisini áhugavert, tí at vit um eitt ár skulu hýsa hesi somu stevnu í Havn. Samskifti hevur tí av góðum grundum longu verið við Parasport Føroyar, og vit halda at tað gongur sera væl.

## Úrval

Úrval játtaði til 2018 oyramerktan stuðul til hesar seks svimjarar: Óla Mortensen (1996), Marius I. Gardshodn (1998), Vár E. Eidesgaard (2001) og Alva Hjelm (1996) úr Havnar Svimjifelag, Signhild Joensen (2000) úr Ægir og Sáru R. Nysted (2001) úr Suðuroyar Svimjifelag. Harumframt fingu vit játtað eina upphædd til tey umleið 15, sum vit í SSF meta liggja beint uttanfyri at kunna fáa persónliga játtan frá Úrvali. Umsitingarvirksemið í samband við Úrval er komið í eitt slag av fastari, umenn krevjandi, legu.

## Landslið

Í november 2017 skipaðu vit fyri landsliðslegu í Klaksvík, undir leiðslu av danska úrvalsvenjaranum Bo Jacobsen, og við høvuðsvenjarum úr føroysku svimjifeløgunum á kantinum eisini, umframt ítróttarsálarfrøðinginum Jón Gregersen.

Hendan lega eydnaðist sera væl, eisini tá ið hugsað verður um eftirfylgjandi úrslit á serliga NM/NJM2017, og varð tað tí skjótt avgjørt at royna eydnuna aftur til luttøku á Danish Open 2018, sum tó vegna vanda fyri verkfalli endaði við at verða Bergen Swim Festival 2018.

Í mars 2018 skipaðu vit fyri aðru landsliðsleguni hetta svimjiárið. Hesa ferð var legan í Vági undir leiðslu av okkara egnu høvuðsvenjarum, og við Páli Joensen sum íbirtara afturat teimum. Legan var sera væleydnað, og vit fingu góð úrslitum á eftirfylgjandi stevnuni í Bergen.

Í summar royndu vit okkum so aftur við eini endurtøku av venjingarleguni á Mallorca í 2017, nú uppundir EM 2018. Hetta átak gjørdist tíverri bert eitt eiti av eini landsliðslegu, tí at hon av ymsum orsøkum endaði við at umfata bara ein svimjara. Hetta tilboð verður tí ikki endurtikið í 2019.

## Sálarfrøði

Í fjør vetur sjósettu vit eina verkætlan við ítróttarsálarfrøðinginum Jón Gregersen. Yvir nakrar mánaðir eygleiðir hann okkara landslið á venjingarlegu og á altjóða meistarastevnum, og síðani lat hann okkum sína eftirmeting, so at vit vónandi kunnu gerast eitt betri virkandi lið.

Jón var millum annað við á venjingarleguni í Klaksvík í november 2017, umframt til NM/NJM2017 í Íslandi og EM á stuttgeil 2017 í Keypmannahavn, og var síðani 'høvuðsnavnið' á Svimjiráðstevnuni fyri nevndarlimir og onnur við Gjógv í mars 2018.

Vit hava bara hoyrt gott frá hesi verkætlan og skilja, at fleiri svimjarar hartil hava valt at arbeiða víðari saman við Jóni, aftaná at verkætlanin í prinsippinum var liðug. Her er enn nógv sum kann gerast betri, og tí eru vit eisini farin undir at avtala nýggj átøk, sum koma nú í nærmastu framtíð.

## Gransking

Sum liður í nevndu FINA OASP verkætlan, eru vit í holt við ymiskar granskingarverkætlanir, harav ein longu hevur verið umrødd í einum vísindaligum tíðarriti. Hátøknilig Tritonwear-útgerð er keypt og latin feløgum, men vit hava enn ávísar avbjóðingar við viðurskiftini rundan um sjálva útgerðina, áðrenn farast kann undir hendan partin av granskingarverkætlanini.

## Antidoping

Føroysk svimjing tekur sjálvsagt fult undir við miðvísa arbeiðnum hjá ÍSF saman við Antidoping Danmark og øðrum, at basa møguligari doping í ítrótti. Tí hava vit eisini eftir áheitan frá ÍSF lagt hendan boðskap út á heimasíðu okkara, við leinki til viðkomandi myndugleikar.

## Breidd

Nú í 2018 bragdaði tað endiliga hjá okkum at fáa skipað fyri einum veruligum breiddartiltaki. Hetta var, tá ið vit við góðari hjálp frá Ægir kundu bjóða til Svimjifagnaðardag 16. september 2018 í Klaksvík. Tiltakið var fyri øll børn í 4. til 7. skúlaflokki, óheft av svimjiførleika ella tilknýti til svimjifelag. Fyriskiparar vóru Joan Kristina í Jákupsstovu og Eyðrið Jøkladal Hansen, eins og lívbjargingarátakið eisini veitti dyggan stuðul.

Hesin dagur tyktist at eydnast væl, bæði tá ið tað var mest spæl, og tá ið álvari kom afturat, við bjargingingarroyndini sum Sørin S. Djurhuus skipaði fyri.

Tað var eitt sindur tungt at skipa fyri tiltakinum. Í juli (FINA hevði avsett 1. juli) noyddust vit at útseta vegna ov fáar tilmeldingar, og nú í september vóru kanska ikki heilt so nógvar sum vit kundu ynskt. Hinvegin var tað tess meira yvirkomiligt, og nú eru vit so mikið nógv betur fyri til at kunna royna aftur næsta ár.

## Svimjiførleiki

Hetta árið hava vit skipað fyri tveimum kanningum av svimjiførleikum í Føroyum. Fyrst hjálpti Gallup okkum við eini kanning av vaksnum, og síðan spurdi vit allar næmingar í 5. flokki. Tað hevur tíverri verið trupult at finna tíð til greiningararbeiðið, men eru teldutøk, og vit ætla at fáa gjørt greiningar nú í næstum.

## Svimjihallir

Umboð fyri SSF eru í fyrireikingarbólkum bæði í sambandi við ætlaða langhylin í Tórshavn, og við ætlaða stutthylin í Runavík. Hetta er virksemi sum krevur tol. Í hesi vikuni vóru vit við til at viðgera ætlaða langhylin í Havn saman við formanninum í FINA Facilities Committee.

## Stuðlar

Høvuðsstuðlar hjá Svimjisambandi Føroya eru Atlantsflog í sambandi við kappsvimjing, umframt LÍV í sambandi við lívbjargingarátak okkara. Avtalan við Atlantsflog varð endurnýggjað nú fyrr í vikuni, meðan tann við LÍV verður at viðgera nú í nærmastu framtíð.

Hesir stuðlar hava víst seg at verið sera dyggir, bæði við tí fíggjarliga, og eisini við praktiskari hjálp innan síni øki, og vit eru tí sera glað fyri at hava teir sum stuðlar. Ambitiónin er tó enn at finna í øllum førum ein høvuðsstuðul afturat til okkara ætlaða svimjiførleikaátak.

# Niðurløga

Hetta var so seinna setan hjá undirritaða sum formanni í Svimjisambandi Føroya, og hevur kenslan verið at vit kláraðu tað so nøkulunda væl, hóast mongu uppgávurnar.

Ein brennandi spurningur er, sum fyrr nevnt, um vit skulu tora at víðka um okkara virksemi. Vit eru jú yvirhøvur fá ið skulu taka okkum av hesum ymiska, og eru tí viðbrekin, serliga tá onkur fær forfall.

Lætta loysnin tykist at vera at byrja at seta fólk, men hetta eigur aftur sum fyrr nevnt at umhugsast væl - tí at tann kósin er trupul at snara aftur.

Stóra fokus hjá okkum er tí á støðugt at trimma skútuna, og at finna loysnir sum gera tað lættari at umsita okkara virksemi, sum at lata SwimRankings reka okkara metlistar.

Eitt annað sum fyllir nógv, er at fáa sett orð á hvussu vit ynskja okkara ítrótt at vera. Svimjiráðstevnan við Gjógv í vár setti fram ynski um at etikkur skal á skránna til komandi ráðstevnu.

Afturat hesum eru okkara vanligu, risaavbjóðingarnar: HM á stuttgeil 2018 í Hangzhou, HM á langgeil 2019 í Gwangju, Oyggjaleikir 2019 á Gibraltar og NM 2019 í Tórshavn.

Spennandi verður. Vegna okkum vil eg takka fyri tað álit sum tit feløg hava sýnt okkum, og takk til tykkum øll sum stríðast til frama fyri føroyska svimjing.

Við svimjikvøðu

Toftir 11. oktober 2018

Vegna starvsnevnd SSF

Rókur í Jákupsstovu